# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*– Vit hava eisini annað at skelka Ísrael við.*
*Hizbollah-leiðarin Hassan Nasrallah*

# Haifa var bara byrjanin

**– Rakettálopið á Haifa broytir alt, sigur ísraelski forsætisráðharrin. – Tað var bara byrjanin, sigur Hizbollah-leiðarin**

MIÐEYSTUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Ísraelsmenn fingu ein skelk, tá Hizbollah-raktttir raktu býin Haifa, og átta ísraelsmenn látu lív. Ikki færri enn trettan rakettir raktu býin innan fyri nøkur sekund. Hizbollah hevði víst, at felagsskapurin er førur fyri at søkja at málum langt inni í Ísrael og ikki bara teimum smáu bygdunum fram við libanska markinum. Tað vísti Hizbollah aftur í morgun, tá rakettir raktu býirnar Nazareth og Aulfa.

Ehud Olmert, forsætisráðharri, segði um vikuskiftið, at rakettálopið á Haifa broytir alt, sum hann tók til, og at Ísrael fer at geva Hizbollah eitt hóskandi og umfatandi svar. Allan gjár bumbaðu ísraelsk flogfør støð har suðuri í Libanon, har Hizbollah heldur til. Fleiri bygningar vórðu javnaðir við jørðina.

Ísraelskar keldur siga, at flogførini søktu fleiri ferðir at einum bygningi, sum verður hildin at vera tilhaldsstað hjá leiðaranum í Hizbollah, Hassan Nasrallah. Hildið verður, at hann fjaldi seg í einum bumbutryggum rúmi undir jørð. Men bumburnar raktu hann ikki, tí í gjárkvøldið gjørdi hann vart við seg.

– Vit fara at halda fram. Hetta er bara byrjanin, og vit hava eisini annað óvæntað at skelka Ísrael við, segði Hassan Nasrallah í einari røðu, sum bleiv send í sjónvarpinum hjá Hizbollah. Hann eggjaði øllum muslimum í tí arabiska heiminum til at taka av tí søguliga møguleikanum til at berja Ísrael og USA niður, sum orðførdi seg. Sjálvur var hann ikki í iva um, at Ísrael fer at tapa hesaferð.

Eygleiðarar, sum sóu Hassan Nasrallah halda røðu, siga, at hann tóktist troyttur, og at hann var ikki so eggjandi, sum hann plagar at vera. Eygleiðararnir siga, at tað eru ikki bara tey áhaldandi ísraelsku álopini, sum hava ávirkað Hizbollah-leiðaran, tí teir seinastu dagarnar er mótstøðan ímóti felagsskapinum vaksin í sjálvum Libanon. Eitt nú hevur drusiski leiðarin, Walif Jumblatt, sagt, at Hizbollah stríðist fyri iranskumáhugamálumheldur enn libanskum.

Í Ísrael spyrja fólk, hvat Nasrallah mundi sipa til, tá hann segði, at Hizbollah hevur ymiskt óvæntað at skelka Ísrael við. Miðeysturtíðindamaðurin Roger Hercz skrivar, at nógvir ísraelsmenn stúra fyri, at Hizbololah fer at brúka rakettir, sum kunnu røkka Tel Aviv. Hildið verður, at felagsskapurin kann hava fingið einar 10.000 rakettir úr Iran, og at fleiri teirra bera rættiliga langt, og í gjár fingu fólk í miðbýnum í Tel Aviv boð um at fyrireika seg til møgulig rakettálop.

## ST uppí

Samstundis veksur altjóða trýstið á Ísrael og Hizbollah. Libanski forsætisráðharrin, Fouad Simiora, gjørdi í gjár greitt, at stjórnin er sinnað at lata herin hava eftirlit við markinum ímóti Ísrael, men at tað letur seg ikki gera uttan hjálp uttaneftir. Tann hjálpin kemur kanska, tí á toppfundinum hjá G8-londunum segði týski kanslarin, Angela Merkel, at londini eru samd um at senda eitt ST-herlið at hjálpa libansku stjórnini. G8-fundurin fordømdi annars ísraelsku álopini á Libanon og kravdi, at Hizbollah skal lata tveir burturfluttar ísraelskar hermenn leysar.

Ísraelska stjórnin hevur lagt sítt egna friðaruppskot fram. Har stendur, at í fyrsta umfari skal Hizbollah lata teir báðar burturfluttu hermenninar frá sær, og síðani skal Hizbollah taka seg burtur frá ísraelska markinum. Men Hizbollah hevur svarað, at tað kemur ikki upp á tal at lata teir báðar hermenninar leysar, fyrr enn fleiri arabiskir fangar sleppa úr ísraelskum fongslum.

Men tað kemur ikki upp á tal, hevur Ehud Olmert sagt.

ST hevur sent nakrar av sínum diplomatum til Miðeysturs at royna at loysa ósemjuna. Teirra millum er fyrrverandi ST-sendimaðurin í Miðeystri, norðmaðurin Terje Rød Larsen.



*Bjargingarmenn í Haifa í ferð við at rudda eftir Hizbollah-rakettálopið, sum kostaði átta mannalív*
*Mynd: Reuters*

# Friðartilgongdin er deyð

**Tey arabisku londini fordøma ísraelsku á Libanon, men tey eru ósamd innanhýsis**

MIÐEYSTUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Tey 22 londini í Arabisku Samgonguni umrøddu ta spentu støðuna í Miðeystri á fundi í egyptiska høvuðsstaðnum Kairo í gjár, og sum væntað samdust tey um eina yvirlýsing,. ið fordømir ísraelsku álopini á Libanon, tí tey eru í stríð við altjóða lóg og reglur.

Men semjan um at fordøma Ísrael merkir ikki, at tey arabisku londini draga eina línu í hesum máli. Meðan Egyptaland, Saudiarabia og Jordan hava funnist at Hizbollah, tí felagsskapurin hevur burturflutt ísraelskar hermenn, geva onnur lond Ísrael alla skyldina av støðuni.

Aðalskrivarin í Arabisku Samgonguni, egyptin Amr Moussa, royndi eisini at sigla millum skerini, tá hann røðu á fundinum í Kairo.

– Summir av pørtunum hava arbeitt ímóti friðarætlanini, og aðrir hava roynt at jarða hana, segði hann.

Amr Moussa legði afturat, at í løtuni er einki lív í friðartilgongdini, og at stríðið ímillum Ísrael, palestinararnar og grannalondini kann einans loysast í ST-trygdarráðnum.